FERÐAFRÁSØGN *Eydna Skaale • eydna@sosialurin*



# Champions League í London

UEFA CHAMPIONS LEAGUE

**Øll fótbóltsáhugað munnu vita, at fótbólturin er høgt í metum í Onglandi. Miðlar kring allan heim gera nógv hóvasták burturúr dystum í Premier League, og hvørt lið hevur stóra áskoðarafjøld, sum trúgv fylgir við liðnum fyri at heppa. Tískil er tað eitt av hæddarpunktunum á mínum London-túri at sleppa til fótbóltsdyst. Og hetta er ikki ein og hvør dystur, men fjórðingsfinalan í Champeons League á Highbury millum tvey London feløg, Arsenal og Chelsea. Skuldi farið og blivið spennandi.**



Uttanfyri Stadion

Klokkan er júst farin av 19, tá eg fari av undirgrundstokinum á Arsenal-station. Tað merkist, at dystur skal verða í kvøld, tí mesta av prátinum í tokinum snýr seg um fótbólt. Fólk hava rigga seg til, eru farin í Arsenal- og Chelsea-troyggjur, turrikløð og keppar. Okkurt hissini flagg sæst eisini. Havi ikki verið til ein so stóran fótbóltsdyst fyrr, so eri ógvuliga spent uppá, hvussu kvøldið fer at ganga.

Eg eri í góðari tíð, so eg seti meg á ein garð at hyggja at fólki. Tað sæst aftur á gøtuni, hvørjaferð eitt tok hevur ført fleiri fólk til Arsenal. Triðjahvønn minutt streymar fólkið úr lítlu tokstøðini, fyllir smølu gøtuna og tysjur síðan í allar ættir. Umleið 90% eru mannfólk. Flestu halda beina kós inn á stadion, men fleiri steðga við smáu sølubúðirnar. Onkur keypir sær fish&chips, onkur okkurt Arsenal-tinganeyst. Menninir í tippingarbúðunum hava eisini úr at gera í dag. Nógvir optimistiskir Arsenal áskoðarar eru her, so ikki er ilt at gita hvat lið verður tippað at vinna.

Brádliga síggi eg tvey kend andlit í fjøldini. Ingi Højsted og beiggi hansara Áki, sum er á vitjan, koma gangandi mitt í øllum rokanum. Vit hava avtalað at møtast her, tí Ingi hevur verið so beinasamur at lova mær aðra av fríbillettunum, sum hann fær til hvønn heimadyst hjá Arsenal. Ingi gongur undan yvir til VIP inngongdina, har hann fer inn eftir atgongumerkjunum hjá okkum báðum Áka.

Tá vit hava fingið tey, er bara eitt at gera, og tað er at skunda sær at finna røttu inngongdina, tí tíðin er um at verða knøpp nú. Tað er nakað lættari sagt enn gjørt, tí vit skulu inn hinumegin stadion, og mugu sostatt ganga ímóti streyminum av viðhaldsfólki, sum øll skunda sær, tí tey eru í seinna lagið.

## Arsenal er samleikin

Eftir fyrst at hava staðið í bíðirøð við skeiva inngongd, síðani runnið til ta røttu inngongdina fyri seinast at ganga ígjøgnum eina minni villiniborg av trappum, gongdum og hurðum, finna vit endiliga setrini. Okkara setur, mitt ímillum Arsenal áskoðararnar. Teir standa allir uppi og syngja og rópa, og eg vóni at teir fara at seta seg niður skjótt, tí eg eri ikki í skóm til at standa uppi í hálvanannan tíma.

Vøllurin er so ótrúliga grønur og flottur, stóri Champeons League bólturin liggur á miðkringinum og alt í einum koma leikararnir út. Hevði tak ligið á, hevði tað uttan iva lætt uppfrá av øllum ganginum, ið nú er at hoyra. Slagsangirnir gella um vøllin, og ljóðið verður kastað aftur og fram. Tá eydkennislagið, sum verður spælt undan hvørjum dysti í kappingini hoyrist úr hátalarunum, verður tó tøgn og løtan tykist heilt hátíðarlig.

Dysturin verður floytaður í gongd og fólk byrja aftur at rópa, syngja og floyta. Lukkutíð seta tey seg niður. Og so rópa og geyla fólk allan hálvleikin á tamb. Onkuntíð meiri, onkuntíð minni, alt eftir hvussu hetjurnar á vøllinum klára seg. Dómarin fær sanniliga eisini nógv orð niður yvir seg, tey flestu ikki egnað at endurgeva her. Tað er ein serligur dámur, og eg kann ikki annað enn lata meg ávirka.

Eg verði rivin við og ynski so innarliga, at teir reyðklæddu, tuskandi menninir har niðri á vøllinum, skulu klára tað. Eg veit, at øll hini, eini 40.000 í tali, hava sama ynski, og hesa løtuna, meðan dysturin varir, hava vit nakað í felag. Vit eru ein eind, ein felagsskapur. Í parti saman ímóti teimum bláu áskoðarunum, sum hava fingið eitt lítið horn av stadion at sita í. Tað eru vit ímóti teimum.

Hóast eg aldrin havi sæð nakran av mínum felags áskoðarum fyrr, aldri fari at síggja tey aftur og ongantíð áður havi hildið við Arsenal, so kann eg hendan hálvanannan tíman, dysturin varir, vera samlík við hini um vøllin. Tað tykist løgið, at 22 mans, ið renna sum fyri lívinum eftir einum bólti, aftur og fram um ein grasvøll, skulu hava so stóra ávirkan á samleikakensluna hjá 40.000 áskoðarum her á staðnum, og einum hvaðna størri tali av sjónvarpsáskoðarum. Men leikararnir eru sambindingin, og summi av hesum fólkunum rundanum meg eru so fast bundin, at tey nærum ikki hava nakran samleika, fyriuttan hetta fótbóltsliðið. Tað er teirra lívsinnihald og tað, sum tey liva fyri.

Í hálvleikinum verða vístar á einum skermi, nakrar heilsanir, sum fólk hava goldið í dýrar dómar fyri: t.d. hann og hann, sum ikki hevur mist ein einasta dyst á Highbury í 60 ár, fyllir í dag… ella …sonur teirra, sum í dag fyllir 3, er longu vorðin Arsenal fjeppari um ein háls, hann verður ein dyggur Arsenal-stuðul seinni o.s.fr.

Hvønn einasta dyst í 60 ár. Hugsa tær hvussu nógvir pengar tað eru tilsamans. Og hvussu nógva tíð av lívinum hann hevur nýtt at geyla á eitt lið.

Men tað hevur so nógv at siga fyri menniskjað at hoyra til. At vera í bólki við øðrum og kenna ein samleika.

## Viðhaldsfólkini, sum hvurvu

Tað er lítið eftir av dystinum nú. Og so við eitt punkterar alt. Hinir fáa sigursmálið. Har fór alt! Nú verður felagsskapurin pettaður sundur. Fólkið hevur ikki hug at syngja longur, onkur gerst illur, og rópar á hini, um at vísa seg sum veruligar fjepparar og heppa á liðið til tað síðsta. Hini gerast ill afturímóti. Tiltikna enska nonchalancan og gentlemanheitin er nú horvin sum døgg fyri sól. Bannan og blótan, og okkurt tárið sæst eisini. Teir fara avstað, daprir í huga, hóast einir 3 minuttir enn eru eftir av leiktíðini. Og nú hvørvur eisini mín fjepparaandi. Leggi í grundini ikki ein pinn í, at teir taptu.

Ein ovurkátur Chelsea-viðhaldsmaður ger tað stóra mistak at koma syngjandi, flennandi og happandi gjøgnum Arsenal fjeppara-útgangin. Tað er eitt, tvey, trý, so syngur hann ikki meir, men má ístaðin henta sær sínar úrsligdnu tenn upp av trappunum.

Komin heilt útum stadion, er bert ein sangur at hoyra, nevniliga Chelsea. Lítið og einki hevur verið at hoyrt til teir undir dystinum, men nú kundi tú næstan trúð, at teir hava verið einsamallir til dyst. Eingin av teimum reyðu áskoðarunum er at síggja nakrastaðni.

Neyðars Ingi Højsted, sum gongur í Arsenal jakka. Hann fær sítt at hoyra um úrslitið.

Bíðirøðin til undirgrundina er ómetaliga long. Tað man taka okkum útvið 20 minuttir, bara at koma inn undir takið á støðini. Og har eru Chelsea sangir og slagorð fyri allar pengarnar. Síggi aftur á tippingarbúðina. Hóast alt, kann eigarin har tó vera glaður í kvøld. Hann man hava fingið alvorliga góða úrtøku.

Inni á tokstøðini skiljast vit aftur, Ingi og Áki skulu ein veg, eg skal hin. Takki fyri meg, og siti brátt í einum stúgvandi fullum undirgrundstoki ávegis til hotellið. Framvegis eru Arsenal fólkini sum sokkin í jørðina. Slagið um London og um semifinaluplássið varð vunnið av Chelsea, og tað skal hátíðarhaldast. Ein ung genta roynir av yvirtala pápan at koma við sær og øllum hinum í býin. Hann sigur nei, men eg haldi meg síggja, at hann hevur hug at fara við. Tá eg fari av, hevur hann framvegis ikki sagt ja, men eg vænti at tey fara í býin saman bæði, ein tannáringadóttur og pápi hennara. Sjálvt millum ættarlið tykist fótbólturin vera bindilið. Sig so ikki tað!













VINN FERÐIR TIL LONDON



# Kennir tú London?

Sosialurin hevur vitjað stórbýin London, og har hevur ein av okkara blaðkvinnum verið runt og sæð, hvat enski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Tað fer hon at greiða frá her í blaðnum, og vit geva tær eisini møguleikan at uppliva henda spennandi bý. Sosialurin skipar nevnliga fyri einari kapping millum lesararnar, har vit burturluta 10 ferðir til London. Hvørja viku draga vit um tvær flogferðir við Atlantic Airways til London.

**Kappingarreglar:**
Kappingin byrjar fríggjadagin 28. mai og heldur fram í fimm vikur. Teir fimm fríggjadagarnar prenta vit eina grein um London, og vit seta eisini tríggjar spurningar, sum tit skulu svara. Tey, sum svara spurningunum, og senda svarini til Sosialin, eru við í lutakastinum um ferðirnar. Svarini skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin eftir, at teir hava verið í blaðnum. Loyvt er ikki at senda avrit av síðuni úr Sosialinum, tí bert veruligar blaðsíður kunnu brúkast í kappingini.



Sosialurin ATLANTIC AIRWAYS

**Vinnarin í seinastu viku:**
Anbjørg Apol
Í Svanga 4
100 Tórshavn

ATLANTIC AIRWAYS

Navn á luttakara:

Bústaður:

**Klipp lepan út og send til Sosialin**

Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801
Sosialurin

Hvør vann dystin millum Arsenal-Chelsea?

1 Svar:

Í hvørjari kapping var hesin dysturin ?

2 Svar:

Uml. hvussu nógvir áskoðarar rúmast á Highbury?

3 Svar: